# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ásla Niclasen, fødd Frýdal, ættað av Velbastað, búsitandi í Keypmannahavn**, andaðist 6. november, 92 ára gomul. Jarðarferðin verður leygardagin 11. november klokkan 11 úr lítla kapellinum í Vestre Kirkegård.

**Jústines Sofus Hansen, úr Saltangará**, andaðist á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi, 89 ára gamal. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík fríggjakvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju leygardagin klokkan 13.

# Thorstein Thomsen 75 ár

Mánadagin 13. november fyllir Thorstein Thomsen í Klaksvík 75 ár.

Thorstein er føddur í Nólsoy tann 13. november 1931. Í 13 ár arbeiddi hann á Borðini, har hann passaði fýrin, og hvønn dag gekk hann teinin millum Borðina og bygdina.

Í novembur 1966 flutti hann til Klaksvíkar, har hann giftist við Elin Sofíu Joensen, Elin hjá Skós, sum var einkja eftir Thorleif Joensen.

Elin hevði 3 børn í fyrru giftu: Jógvan Páll sum býr í Klaksvík, Siggvard, sum er giftur við Aud, tey eiga 3 børn og búgva í Havn, og Torgunn, sum er gift við Peter, tey eiga eitt barn og búgva í Danmark.

Saman eiga Thostein og Elin døturnar Margreth, sum er gift við Róa Vang, og Sigrun, sum er gift við Ingolf Joensen. Tær búgva báðar í Klaksvík. Barnabørnini eru 7 í tali.

Í Klaksvík fór Thorstein at arbeiða á Kósini, og var hann har í 32 ár, til hann fór frá í 1998, 67 ára gamal.

Dagurin verður hildin fríggjadagin 10. novembur í heiminum á Ziskagøtu 10 frá kl. 19





Við hesum verður sagt frá, at eg fari úr starvi sum kommunlækni tann 31. desember 2006

Um áhugi er, eru tygum vælkomin til ábit heima á Ryggsgøtu 3, Argir, leygardagin 11. november 2006 frá kl. 16.00

**TAKK** til tykkum, ið hava verið trúgv móti mær hesi árini

**Kristianna Nordendal**
Kommunulækni

# Søgan um »Norske Løve« komin út í bók

**Dansk/føroyski rithøvundurin Bjarni Åkesson Filholm hevur enn einaferð givið eina bók út um skipasøgu. Hesaferð er hann farin 400 ár aftur í tíðina og hevur skrivað eina bók um danska skipið »Norske Løve« sum fórst í Lambavík í 1707**



*Bjarni Åkesson Filholm hevur skrivað bókina »Norske Løve – stolt skib, krank skæbne«*




BÓKAÚTGÁVA

Tann 4. december 1707 sigldi danska handilsskipið »Norske Løve« úr Keypmannahavn. Túrurin skuldi eftir ætlan vera norður um Skotland, gjøgnum Atlantshavið suður um »Kap Det Gode Håb« og so víðari til donska hjálandið Trankebar i India.

Skipið var lastað við gulli til at keypa kryddurtir og aðrar vørur fyri í Trankebar. Men so langt kom skipið ongantíð.

Jóladagarnar í 1707 var eitt ógvusligt ódnarveður í Atlantshavinum. Norske Løve fór av kós og nýggjáraftan tók skipið botn á Lambavík í Føroyum.

Bókin sigur frá um Norske Løve og dramatisku ferðina í 1707, skipbrotið á Lambavík og tað spennandi torgreiddu bjargingina av manningini, bjargingina av farminum og sjóforhoyrið í Havn.

Rithøvundurin hevur roynt at kanna hvat er at finna av lutum frá Norske Løve í dag. Millum lutirnar frá skipinum er ein klokka í Havnar kirkju frá skipinum, men hvar sjálvt vrakið av skipinum er, er enn ein gáta.

»Norske Løve – stolt skib, krank skæbne« er ein áhugaverd bók og enn ein brikkur í føroyskari søgu og í danskari sjófarts- og hjálandasøgu.

Bókin er 136 blaðsíður, og tað er »Forlaget Nautilus«, sum gevur hana út. Bókin er at fáa í bókabúðunum.

## Móttøka



Vegna tað at Grón hevur yvirtikið Bakaríið hjá Gunleivi, verður boðið til móttøku á Hoyvíksvegi 65 fríggjadagin 10. november millum kl. 15.00-18.00

Sveinur Thomasen & Regin Nielsen
**P/f Grón**

## Móttøka

**Í sambandi við at Laura Poulsen hevur 30 ára starvsdag verður boðið til móttøku á Føroya Barnaheimi 10. november frá kl. 15.00 til 17.00.**

**Dagurin í morgin**

**10. november. Luther.** Sjálvandi ikki komin í álmanakkarnar sum halgimenni, men dagurin er í luthersku kirkjuni settur sum minningardagur Luthers. Hann varð borin í heim 10. november í 1483 í Eisleben í Týsklandi.